## DAGSINS MEINING

# Maskinmeistararnir

Málið um maskinmmeistararnar hjá Fiskiveiðieftirlitinum er ein løgin søga. Tað gamla og hátt virda yrkisfelagið, Maskinmeistarafelagið, hevur stríðst fyri at fáa sáttmálaviðurskiftini á vaktar- og bjargingarskipunum í rættlag. Sum ein liður í hesum stríði søgdu meistararnir á skipunum seg úr starvi. Hetta varð gjørt fyri at stuðla felagnum. Men hetta vápn virkar bara, um allir starvsfelagar standa saman. Eitt slíkt tiltak hevur tí sum fortreyt, at eingin starvsbróðir uttan fyri skipanina søkir størvini hjá teimum, ið hava sagt upp. Bert á hendan hátt kunnu teir, ið hava stríðst fyri betri sømdum, heysta fruktirnar av sínum stríði. Maskinmeistarafelagið hevur tí heitt á allar sínar limir um ikki at søkja størvini. So langt so gott. Men sum øllum kunnugt gekk ikki, sum Maskinmeistarafelagið og meistararnir á vaktar- og bjargingarskipunum høvdu ætlað og væntað. Nakrir av starvsbrøðrum uttanfyri Fiskiveiðieftirlitið søktu størvini og fingu tey.

Eftir hendingina hava ábreiðslurnar á teir, sum hava fingið størvini hjá stríðsmonnunum, ikki trotið. Men teir vónsviknu meistararnir og felag teirra tykjast gloyma størstu syndarnar í hesum máli. Hesir eru almenni arbeiðsgevarin – fiskimálaráðharrin og ovasti maður í starvsfólkamálum: fíggjarmálaráðharrin. Við at góðtaka hesa mannagongd hava hesir myndugleikar evstu politisku ábyrgdina av óskilinum. Vit loyva okkum at ivast, hvørt her bert er talan um tilvild. Síðan fullveldissamgongan tók við hava vit upplivað ein margháttligan og harðrendan almennan starvsfólkapolitikk. Ein politikk, sum er eyðkendur av andsøgnum og illvilja mótvegis yrkisfelagsskapunum og fakfelagsrørsluni sum heild.

Andsøgnirnar vísa seg við, at tað almenna proklamerer ein nýggjan setanar- og starvsfólkapolitikk. Bert sakligar grundir skuldu vera støði undir almennum setanum. Men myndin í gerandisdegnum er ein heilt onnur, tá starvsfólkapolitikkur skal innast í verki. Hvat liggur aftan fyri atburðin móti Maskinameistarafelagnum? Er hetta ein avleiðing av, at løgmaður hevur avreitt starvsfólkapolitikkin? Er hetta hevnd? Er hetta ein gerð til skrekk og ávaringar fyri onnur virkin og framfýsin yrkisfeløg? Er hetta eitt mál fyri umboðsmannin?

Er tað ikki í ljósinum av øllum hesum, ið trætan millum Maskinmeistarafelagið og landsstýrið kanska skal síggjast. Talan er kanska ikki um eina tilvildarliga trætu. Er atburður Fiskiveiðieftirlitsins og fíggjarmálaráðsins ein liður í einum miðvísum politikki, ið hevur til endamáls at gera føroysk yrkisfeløg veikari. Var tað ikki henda samgongan, ið legði út við at tosa um íslendskt lønarlag? Hetta er ein ørkymlandi støða, ið reisir nógvar moralskar og politiskar spurningar.

Landsstýrismenninir hava enn møguleika at fáa hetta mál aftur á rættkjøl við at fara inn í málið og beina burtur tann órætt, ið er framdur móti tænastumonnunum á vaktar- og bjargingarskipunum. Eftir tað seinasta, ið er hent, har teir, ið høvdu søkt størvini móti ráðum Maskinmeistarafelagsins, hava tikið umsóknir sínar aftur, er høvi at geva hesum máli eina sømiliga loysn. Henda loysn má merkja, at teir "gomlu" maskinmenninir fáa síni størv aftur. Og hetta kann væl bert gerast við eini politiskari avgerð, har báðir avvarandi landsstýrismenn eru samdir um eina slíka loysn. Hendir hetta ikki, eigur løgtingið at hyggja at málinum og kanna, um teir hava umsitið hetta mál á fullgóiðan hátt.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Kom og dyrka ónøgdina!

**Rúni Nielsen**
*Ein nøgdur ófaklærdur*



Tað letur til, at ónøgdin hevur góðan gróðrarbotn í landið okkara. Men eg haldi henda gróðrarbotn vera væl veltan og sáddan av ávísum fakfelagsleiðarum. Ongin nevndur ongin gloymdur. Farið verður í skotgrøvina øðrumegin áðrenn samráðingarnar byrjar. Hin parturin stendur sum kánus. Hann veit úrslitið. Verkfall er úrslitið hvussu víkir ella vendir. Hetta er ein meldur undar slit. Viðurskiftini millum arbeiðstakara og -gevara versnað ár um ár. Men verkfallið býtur seg aftur í halan. Sama dag sum verkfallið byrjar fer prísurin á gerandisvørum upp. Hetta kemst av dýrkaðari lossing, útkoyring, tænastu og øðrum dagsverkið framt av tímaløntum er. Lønarhækking verður etin upp av príshækking. Eisini missa tey, sum eru verkfallsrakt, stóran part av síni inntøku. Tað tekur á og dag at vinna mista fongin innaftur. Men hvat? Júst komin uppundan aftur, er aftur verkfall. Meldurin heldur áfram. Hvat er stóra ætlanin aftanfyri verkføllunum? Er tað at taka lívið av ymsum vinnum her á landi? Er tað at fáa fólk frá at útbúgva seg? Tímalønin hjá ófaklærdum er nú so nær handverkaralønini, at áratíggjur skulu til fyri, at handverkarin merkir ágóðan av, at hann fór í læru til sítt lívsverk. Er hetta rætt? Er endamálið at enda bert at markerað seg, dyrkað ónøgdina og vísa, hvussu stórt vald ein fakfelagsformaður hevur? Eg spyrji bara.

# Niddingar og svíkjarar

**Heini Dahl**
*Oyndarfjørður*

Fíggjarmálastýrið hevur nú í langa tíð sópað alt Norðureuropa fyri at finna niddingar og svíkjarar til at manna okkara bjargingarskip við. Soleiðis kunnu tænastufólk í fíggjarmálastýrinum ótarnað røkta teirra egnu forfengiligheit, til ógagns fyri Føroya Fólk. Maskinstjórin á Brimli og tit tíggju, sum nú standa uttan arbeiði, mugu síggja í eyguni, at tit hava tapt móti fíggjarmálastýrinum. Sjey navnleys fólk av tykkara egnu stungu tykkum í ryggin. Her má eg síga sum norðmaðurin. "Fy for fanden" .

At fáa umboðsmannin at kanna Fíggjarmálastýrið er slett ikki óhugsandi. Prosessin tekur langa tíð, so tit eru helst deyðir í raki, áðrenn nakað úrslit fæst hagani. Tí vil eg vóna, at tit bliva settir í annað starv skjótt.

# »Miðeystur og vit«

**ÍSRAELSFELGIÐ**
*Tíðindaskriv*

Á aðalfundinum hjá Ísraelsfelagnum sum var hildin á Hotel Hafnia tann 27.04.03 hevði Símun Absalonsen sera áhugaverdan fyrilestur við heitinum »Miðeystur og vit«.

Fyrilesturin lýsti grundleggjandi spurningin millum kristindómin, jødadómin og islam.

Ísraelsfelagið vónar, at Símun kann halda henda sama fyrilestur aðrastaðni kring landið. Ísralsbólkurin úr Gøtu sang hebraisk og føroysk løg.

Í samband við nevndarval fóru onkrar smáar broytingar fram - í nevnd vóru vald:

Svenning av Lofti, formaður, Maigun Solmunde, næstformaður, Brynhild Poulsen, skrivari, Álvur Kirke, kassameistari, Poul Johan Djurhuus, nevndarlimur, Rikka Øregaard, eykalimur, Sámal Bláhamar, eykalimur.

# Tjant – nýggj fløga frá Tutli

**FLØGUÚTGÁVA**
*Tíðindaskriv*

Plátufelagið TUTL gevur í hesum døgum út nýggja fløgu. Fløgan kallast »TJANT«, og manningin á fløguni er: Heðin Ziska Davidsen – gittar, Anders Hagberg – floyta og saksofon, Mikael Blak – kontrabass og Brandur Jacobsen – trummur. Løgini eru øll skrivað av Heðin Ziska Davidsen og tónleikurin er improvisatiónstónleikur við íblástri av jazzi, rokki og etniskum tónleiki. Manningin kann sigast at vera avleggari av bólkinum Yggdrasil, ið seinni á árinum fer á konsertferð í Evropa og USA.

Í samband við útgávuna verður konsert í Losjuni í Gøtu, fríggjakvøldi 16. mai kl. 21.00. Har verður tónleikur av fløguni framførdur, umframt at Headache Blues Treo spælur. Tað er tónleikasamtakið Grót, ið skipar fyri konsertini.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Búskaparfrøðingur ella politiskt valevni

**Annita á Fríðriksmørk,**
*tingkvinna Tjóðveldisfloksins*



Magni Laksafoss hevur í Sosialinum 16. mai nakrar hugleiðingar um búskapargongdina.

Trupulleikin er bara at M.L. fleiri ferðir mótsigur sær sjálvum í samrøðuni, og at hann til tíðir sigur beinleiðis ósatt.

Tað sum hevur eyðkent M.L. í sínum úttalilsum seinastu árini er, at óansæð hvørji politisk stig sitandi samgonga tekur, so meinar hann, at tað samgongan ger, er nakað lort. Samrøðan í Sosialinum 16. mai er í so máta onki undantak. Trupulleikin er sjálvandi at M.L. úttalar seg sum politiskt valevni hjá sambandsflokkinum meðan hann titillerar seg sum búskaparfrøðing.

### Aldukambur ella uppgongd

Tá ið tosað verður um framtíðina er altíð áhugavert at hoyra spádómar frá frøðingum um hvønn veg vit fara. Men tað sum er imponerandi við M.L. er, at hann megnar í eini og somu samrøðu at vísa á, hví búskapargongdin í samfelagnum nú fer at fara bæði uppeftir og niðureftir.
M.L verður siteraður fyri at siga bæði. Fyri tað fyrsta, at skattalættin er ótíðarhóskandi nú, tí so nógv ferð er á búskapinum, og at skattalættin vil einans føra til økt virksemi, økt lønarkrøv og harvið økir um búskapin. Men seinni í samrøðuni broytir hann meining um ferðina, nú sigur hann, at ferðin er steðgað, at vit eru á aldukambinum, og meinar hann tí: "at tað var nú, at tað almenna skuldi átt penging at slúsa út í samfelagið fyri at hildið virkseminum uppi".

Ikki eiti á. Nú verður knappliga rátt okkum til at steðga ferðini á búskapinum og til at slúsa pengar út samfelagið fyri at halda virkseminum uppi. Eg meini tað.

### Førdi fíggjarpolitikkurin:

Í blaðnum verður samrøðan býtt upp í tvær greinar. Onnur av greinunum ber yvirskriftina: "Fíggjarpolitikkurin hjá sitandi samgongu skyldina av, at lønarkrøvini eru so stór"; og har kemur so ein røð av atfinningum.

Vit eru nokk samd um, at alt er ikki gott hvørki í samfelagnum ella við sitandi samgongu, men at nógv er vorðið nógv betri síðani sitandi samgonga tók við fyri 5 árum síðani, man verða ringt at mótmæla.

Orsøkirnar eru í høvuðsheitum, at búskapurin hevur verið uppgangandi í grannalondunum, at fiskiskapurin og fiskiprísirnir hava verið positivir og at fleiri tiltøk frá politiskari síðu hava megnað at handfarið uppgongdina. Her skulu verða nevnd nøkur dømi:

### Lønarvøksturin og gjógvin

Tað er rætt at almennu útreiðslurnar eru øktar nógv síðani kreppuna, men stórur partur er farin til tann lønarvøkstur, sum lønmóttakarin misti gjøgnum kreppuárini. Vit hava eisini sæð at gjógvin millum tær høgu og tær lágu inntøkurnar er minkað heilt fitt hesi árini sitandi samgongan hevur sitið.

### Sjálvberandi búskapur

Nakað, sum eisini eyðkennir førda búskaparpolitikk er stevnan um sjálvberandi búskap. Hendan samgongan, sum hevur sitið í fimm ár, hevur megnað at skorið blokkin við einum triðingi hetta tíðarskeiðið. Hetta hóast øgiligt trýst um meirútreiðslur frá øllum síðum. Hetta at hava sjálvberandi búskap er eitt mál, sum allir flokkar siga seg verða fyri, men M.L veit nokk, at tað eru ikki allir, sum høvdu tora at framt hetta í verki. Sambandsflokkurin sum var ímóti niðurskurðinum av blokkinum hevði óteljandi dømi um, hvussu hasar 366 mió kundu verið brúktar til almennar tænastur. Tær somu almennu tænasturnar, sum M.L sigur verða øktar alt alt ov nógv.

### Stuðul til vinnulívið

Eisini hevur hendan samgongan megnað at latið verið við at slúsa pengar út aftur í stuðul til vinnulívið. Hóast øgiligt trýst frá bæði andstøðuni og pørtum av samgonguni. Men førdi fíggjarpolitikkurin megnaði at halda hesum aftur.

### Lutfallið millum málsøkini

Førdi fíggjarpolitikkurin seinastu árini hevur eisini víst, at tað bar til at broyta lutfallið millum, hvussu nógv verður latið til ymsu málsøkinum í samfelagnum. Fíggjarpolitikkurin hevur nemliga víst, at almannamál, heilsumál, mentan og útbúgving hava verið nógv hægri raðfest nú enn nakrantíð áður.

Samanumtikið er neyvan nakar ivi um, at førdi fíggjarpolitikkurin hjá sitandi samgongu hevur slóðað fyri nógvum og grundleggjandi broytingum í føroyska samfelagnum. Broytingum, sum hava gagnað flestum føroyingum, og sum koma at seta positiv spor langt inn í framtíðina.

# Profetiirnar hjá Eilifi

**Høgni Hoydal**



Eilif Samuelsen viðger í lesarabrævi røðuna, sum undirritaði helt á aðalfundinum hjá Føroya Lærarafelag.

Í stuttum, so roynir Eilif at skúgva kjarnuna í røðu míni til viks. Hann fer aftur á gamla lagið um, at vit (altso sambandsflokkurin) gjørdu tað og tað, men tit hava bara elvt til rok, síðani tit tóku við.

Veruleikin er tann, at vit hava brúkt nærum 5 ár at rudda upp í tí vánaligu fyrireikingini, sum Eilif Samuelsen og hansara samgonga gjørdi, tá tey samtyktu nýggju fólkaskúlalógina.

### Lógir og karmar hanga saman

Víst inniheldur nýggja fólkaskúlalógin nógv gott og hon var eitt stórt framstig. Og víst verður nógv ótrúliga gott arbeiði gjørt á skúlunum við nýggju lógini.

Men hon var alt ov illa viðgjørd og ov illa umhugsað politiskt, áðrenn hon varð sett í verk. Við tí úrsliti, at tað positiva, sum átti at verið grundarlagið undir okkara fólkaskúla, endaði alment í einum longum víggi um pening, játtanir, niðurskurðir og uppgávur hjá lærarunum, heldur enn í orðaskifti um at seta nýskapan í verk og geva skúlunum rúmd og ábyrgd.

Tí hava vit nýtt so stóra orku til at viðgera og skapa karmar um tann góða fólkaskúlan eftir arbeiðið hjá Eilifi, har hann ikki útvegaði fólkaskúlanum neyðugar karmar at fremja tann góða skúlan.

### Alt er gjørt seinni

Eilif nevnir tildømis skúlastýrini. Ja, tey setti Signar á Brúnni í verk, meðan hann sat sum landsstýrismaður. Vit hava lagt ætlanir og brúkt øgiliga orku uppá at fáa sett í verk møguleikarnar í nýggju fólkaskúlalógini - onki varð fyrireikað frá undanfarnu samgongu.

Og vit hava hækkað játtanina til fólkaskúlan við 50 prosentum, síðani Eilif Samuelsen sat. Men vit mugu sjálvandi spyrja, um vit fáa nóg nógv gott burturúr?

Annlis Bjarkhamar hevur sett sjøtul á eitt gott og veruligt arbeiði saman við skúlunum um, hvussu vit fáa trivnaðin og tann góða fólkaskúlan á skránna. Og hetta arbeiðið skal nú fylgjast upp.

Tað var høvuðsboðskapurin í míni røðu.

### Fakfeløg eru meira enn limatreytir

Tá Eilif Samuelsen sigur, at eitt fakfelag bara skal takast við lønar- og sáttmálaviðurskifti hjá sínum limum, so eri eg beinleiðis ósamdur. Eitt fakfelag er nogv meira enn tað. Tað haldi eg eisini, at Føroya Lærarafelag hevur prógvað í síni longu søgu. Felagið hevur eina langa siðvenju fyri at ganga undan at viðgera skúlaskap, pedagogikk, innihald í læringini og at útvega amboð til at røkka málunum.

### Profetiirnar halda vónandi

Eilif Samuelsen spyr at enda, um hetta er profetisk tala hjá undirritaða, at vit nú skulu tosa um innihald og mál, heldur enn um sáttmálaviðurskifti og pengar. Og svarið er: Ja, vónandi verður tað profetisk tala.

Eg vóni, at vit nú hava ruddað upp í tí mesta, sum hevur ligið á láni, soleiðis, at teir praktisku spurningarnar fara at menna seg nattúrliga við okkara málum fyri skúlan.

### Profetiirnar hjá Eilifi

Hinvegin kann eg sláa fast, at profetiirnar hjá Eilifi Samuelsen, hava víst seg at vera luftkastellir.

Serliga Tjóðveldisflokkurin og Signar á Brúnni vístu á og ávaraðu um tær vantandi fyrireikingaranr og tær vantandi fíggjarligu metingarnar og raðfestingarnar, tá nýggja fólkaskúlalógin varð skundað ígjøgnum. Men Eilif Samuelsen segði fyri Løgtinginum, at nýggja fólkaskúlalógin fór ikki at kosta nógv meira. Kanska eina millión meira um árið til sjálvan fólkaskúlan og so einar 6 milliónir til forskúlaskipan, varð sagt tá.

Til upplýsingar, so hava vit síðani 1997, tá Eilif sat sum landsstýrismaður, økt játtanina til fólkaskúlan við 73 milliónum krónum.

So góði Eilif Samuelsen. Eg hevði ynskt at tú hevði hugsað longur fram, gjørt fyrireikingar og gjørt nakrar haldbarar profetiir, áðrenn tú legði fólkaskúlalógina fyri tingið.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!